# Sølan av bilum fer helst at minka






**Treystitalið hjá føroyska brúkarunum fall aftur í januar, vísir konjunkturbarometrið hjá Fíggjarmálaráðnum fyri januar 2008. Eitt nú hava 66 prosent av føroyingum ikki ætlanir um at keypa bil komandi árið**

BILASØLA

Konjunkturbarometrið hjá Fíggjarmálaráðnum fyri januar 2008 vísir at treystitalið hjá føroysku brúkarunum er nógv fallið seinasta árið. Frá juni 2007 til januar 2008 er treystitalið fallið 7 prosentstig. Seinasta árið er samlaða treystitalið fallið 11 prosentstig, úr 9 niður í minus 2 frá januar 2007 til januar 2008.

Samlaða treystitalið hjá føroysku brúkarunum er grundað á væntaðu fíggjarstøðuna, mettu gongdina í føroyska búskapinum, metta arbeiðsloysi og uppsparingina komandi árið. Sum heild vænta føroysku brúkararnir prísvøkstur og verri tíðir. Tað sæst aftur í so at siga øllum spurningunum.

Í einum av spurningunum í konjunturbarometrinum hjá Fíggjarmálaráðnum verður brúkarin spurdur, um hann ætlar at keypa bil komandi 12 mánaðirnar.

**Talva 1: Konjunkturbarometur føroyska brúkarans**

| Mánaði | jan.-06 | Jun.-06 | jan.-07 | Jun.-07 | Jan.-08 |
|---|---|---|---|---|---|
| 13. Ætla at keypa bil næsta árið | -54 | -59 | -58 | -60 | -66 |
| -Ógvuliga sannlíkt | 8 | 7 | 6 | 7 | 4 |
| -Nakað sannlíkt | 11 | 8 | 11 | 9 | 12 |
| -Ikki sannlíkt | 23 | 26 | 21 | 23 | 17 |
| -Avgjørt ikki sannlíkt | 57 | 57 | 60 | 60 | 67 |
| -Veit ikki | 1 | 3 | 1 | 2 | 1 |

Úrslitið av spurninginum í seinastu kanningini var -66. Tað merkir, at 66% av føroyingum ikki hava ætlanir um at keypa bil komandi árið.

Í seinastu kanningini, fyri juni 2007, var talið -60. Tað merkir, at nú eru 6% fleiri, sum ikki ætla at keypa bil komandi árið. Sostatt bendir alt á, at bilasølan fer at minka komandi árið.

*Kelda: Fíggjarmálaráðið*

** Treystitalið er tað sama sum konjunkturindikatorin.*

# VW Scirocco í Geneve

Ein heilt nýggjur VW hevur heimspremieru á bilaframsýningini sum er í Geneve í Sveis frá 6. til 16 mars. Talan er um VW Scirocco, sum kemur júst 34 ár eftir at fyrsti Scirocco var sýndur fram á sama stað í 1974.

VW Scirocco var í veruleikanum ein sportlig útgáva av tí fyrsta VW Golf - ein bilur við tveimum hurðum og stórari baklúku. Scirocco var helst fyrimyndin hjá Honda Accord, ið varð nógv seldur í Føroyum í 70-unum sum vørubilur við tveimum setrum.

**mg**




*Ein heilt nýggjur VW Scirocco hevur heimspremieru á bilaframsýningini í Geneve*



*VW Scirocco kom fyrstu ferð á marknaðin í hesi útgávuni í 1974*



*VW Scirocco er ein sportligur bilur við tveimum hurðum og stórari baklúku*



*Honda Accord frá 70-unum varð gjørdur við Scirocco sum fyrimynd*